# Kongaríkið í Bábylon

Kongaríkið í Bábylon
liggur so langt frá fjallafonn.
Siglir tú leingi og stýrir væl,
hetta ríkið tú vinna skal.

Har býr kongsdóttir von og fríð,
hon hevur eyguni blá og blíð,
víða gitin í hvørja ætt,
hjartað er gott og lyndið lætt.

Sær hon knørr tín og hugsar tá:
"Hvaðani kemur hasin frá?"
Gongur hon sær til sjóvarstrond,
rættir hon tær sína ljósu hond.

"Ver vælkomin frá fjallafonn!
Nú skalt tú búgva í Bábylon,
ríki faðir skal geva tær
nógvan pening og stóran garð."

Strikar á bunka tú gyltu rá,
brosa eyguni blíð og blá,
ganga tit síðani hond í hond
heim til kongin frá sjóvarstrond.

"Hoyr tú, kongur í Bábylon,
her kemur maður frá fjallafonn.
Gev mær dóttur og hálvt títt fæ."
Gamli gongurin sigur: "Ja."

Setir hann krúnu á høvur títt.
"Nú skalt tú eiga ríki mítt ."
Lítli maður frá jallafonn
verður kongur í Bábylon.

Liggur so langt frá fjallafonn
kongaríkið í Bábylon,
vindur tó piltur sær segl í rá,
siglir so hesum landi frá.

"Abbi mín, abbi mín, her komi eg
aftur av ferðum at vitja teg.
Lítli maður frá fjallafonn
og so prinsessan av Bábylon."

*Hans Andrias Djurhuus yrkti. Barnarímur 1915*